## Fjepparar flokkast á Amager

Fjepparafelagið Blå/Hvide Engle stuðlar Fremad Amager, sum hevur føroyskar eigarar, og sambært heimasíðuni hjá Fremad Amager hevur felagið vind í seglunum. Í august og september mánaði fekk felagið 40 nýggjar limir, og framvegis eru tað fólk, sum tekna seg sum lim í felagnum. Í løtuni eru fleiri enn 200 fólk við í fjepparafelagnum á Amager.



## Fremad Amager ikki til at steðga

Sunnudagin spældi Fremad Amager aftur í donsku landskappingini í fótbólti. Dysturin var ímóti Værløse, og Fremad Amager vann dystin 2-1. Hetta var sætti sigurin á rað í 2. deild eystur, og Fremad Amager liggur á odda í deildini. Fremad Amager legði seg á odda 2-0, men tá ið Lennart Lynge Larsen síðani bleiv útvístur, mátti Fremad Amger arbeiða sigurin heim. Tað gekk, og føroyska felagið á Amager hevur beina kós ímóti 1. deild.

# Danski dreymurin brast

**Danski dreymurin um at røkka sjeynda EM-endaspælinum á rað brast um vikuskiftið, tá teir taptu 3-1 fyri Spania á heimavølli. Harafturímóti livir skotski dreymurin í bestu vælveru eftir enn ein sigur í EM-undankappingarbólki B, har Føroyar eisini er ein partur**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Danski dreymurin um at røkka EM-endaspælinum brast á NRGi Park í Århus leygarkvøldið, tá Spania vann 3-1 í týdningarmikla lagnudysitnum. Nú er í staðin alt, sum týðir uppá, at tað vera Svøríki og Spania, sum fara til EM.*

*Mynd: Polfoto*

Heili 21 landsdystir vóru á skránni í EM-undankappingini um vikuskiftið, og tí vóru sjálvsagt eisini fleiri ógvuliga týdningarmiklir dystir á skránni, sum kundu kosta onkrum av liðunum luttøkuna í EM-endaspælinum, sum verður í Sveis og Eysturríki komandi summar.

Samstundis sum fleiri av liðunum kundu missa møguleikan at røkka EM-endaspælinum komandi summar, so vóru tað eisini onnur lið, sum endaliga kundu spæli seg í endaspælið. Leygardagin megnaði fyrsta tjóðin nevniliga eisini at tryggja sær endaliga luttøka til endaspælið, umframt vertirnar úr Sveis og Eysturríki.

### Danmark tapti lagnudystin

Ein av mest spennandi dystunum leygardagni bleiv spældur á NRGi park í Århus, sum hýsti landsdystinum millum Danmark og Spania, og hjá dønum var kravið greitt undan dystinum. Einki uttan ein sigur kundi brúkast ímóti sterku spaniólinum.

Tað byrjaði tó einki serligt hjá dønum, tí eftir bert einum knøppum korteri legði Raul Tamudo Spania á odda við einum góðum skallara. Tað skuldi tó blíva enn verri fyri vertirnar, tí stutt undan steðginum bleiv danska verjan spæld sundur og saman. Hetta endaði við, at Sergio Ramos bleiv fríur ímóti Sørensen, og Ramos var ískaldur, tá hann sendi bóltin í málið til 2-0, sum eisini var hálvleiksstøðan.

Eftir steðgin kom Danmark nógv betri við í dystin, og nú sótu teir á tí mesta. Teir megnaðu eisini at spæla seg fram til fleiri stórar møguleikar, men Casillas í spanska málinum stóð ein branddyst. Tveir minuttir fyri tí bragdaði tó endiliga hjá Danmark, tá innskifti Perez spældi Tomasson púra leysan. Hesin smekkaði til, og Casillas var prísgivin, og so var spenningur í aftur á NRGi Park.

Hesin helt sær tó ikki leingi, tí bert ein minutt seinni svaraði Spania aftur við einum sera góðum langskoti frá innskifta Albert Riera, og so var alt liðugt fyri Danmark.

Eftir at sviar eisini vunnu sín dyst í hesum bólkinum ímóti Liktinstein førir úrslitið hjá Danmark við sær, at møguleikin at koma víðari bert er teoretiskur, og tí kann mest sum staðfestast, at Danmark helst ikki kemur at taka lut í einum EM-endaspæli fyri fyrstu ferð síðani 1980.

### Skottland vinnur og vinnur

Í EM-undankappingarbólki B, har Føroyar er eitt av liðunum, gongur sera javnt á í oddinum. Men heldur óvæntað, so var tað Skottland, sum lá á odda í bólkinum undan dystunum um vikuskiftið. Skottland skuldi tó á pappírinum spæla ein rættiliga harðan dyst á heimavølli ímóti Ukraina, meðan Italia og Frakland høvdu lættari dystir ímóti ávikavist Georgia og Føroyum.

Bæði Italia og Frakland gjørdu eisini sína skyldu við at vinna ávikavist 2-0 og 6-0 ímóti Georgia og Føroyum, men tað, sum ver heldur meir yvirraskandi var, at Skottland enn einaferð vann ein rættiliga sannførandi sigur í hesum bólkinum. Úrslitið av dystinum gjørdist ein 3-1 sigur til skotar, og dysturin var bert 10 minuttir gamal, tá Skottland í roynd og veru hevði avgjørt. Tá vóru teir nevniliga á odda 2-0 við málum frá Miller og McCulloch. Ukraina skapti tó spenning í aftur miðskeiðis í fyrra hálvleiki, tá stóra stjørnan, Andriy Shevchenko, minkaði um munin, men enn einaferð skuldi skotski liðskiparin taka ábyrgd. Um miðjan seinna hálvleik økti James McFadden nevniliga aftur um leiðsluna fyri Skottland upp í 3-1 við einum góðum máli, og so var liðugt á Hampden Park.

Við sigrinum er Skottland enn á odda í undankappingarbólki B, men munurin niður til Italia og Frakland er bert eitt og tvey stig, so alt kann enn henda í hesum bólkinum.

### Týskland víðari sum fyrsta liðið

Úrslitini í landsdystunum um vikuskiftið førdu eisini við sær, at fyrsta liðið í EM-undankappingini hevur spælt seg víðari til endaspælið umframt Sveis og Eysturríki, sum jú hýsa EM-endaspælinum. Við javnleiki 0-0 á útivølli ímóti Írlandi er Týskland nú so langt framman fyri júst Írland á triðja plássi, at hesir ikki kunnu fanga teir aftur, og tí verður Týskland heilt víst millum londini í Sveis og Eysturríki komandi summar.

Umframt Týskland, so eru eisini fleiri lið, sum eru á gáttuni at spæla seg í EM-endaspælið. Bæði Pólland og Portugal hava góð kort á hondini í bólki A, meðan Kekkia sær út til at fylgja Týsklandi til EM-endaspælið úr bólki D. Harafturat er Kroatia væl fyri í bólki E, meðan Svøríki og Spania síggja út til at vera liðini, sum spæla seg víðari út bólki F. Til allarsíðst er eisini Romenia á EM-kós eftir sigur í toppdystinum í bólki G ímóti Hollandi.